# Reglugerð fyri lestrarráð á Fróðskaparsetri Føroya

Við heimild í § 17 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya við seinni broytingum ásetur Stýrið hesa felags reglugerð galdandi fyri øll lestrarráð á Fróðskaparsetri Føroya.

## Endamál

Lestrarráð skulu tryggja dygdina í útbúgving og undirvísing á Fróðskaparsetri Føroya og tryggja undirvísarum og lesandi ávirkan á innihaldið í undirvísingini.

## Virkisøki og heimildir

Yvirskipaða uppgávan hjá lestrarráðunum er at hava eftirlit við, at útbúgving og undirvísing verða støðugt mentar.

Lestrarráð hava tí m.a. til uppgávu at:

1. Virka fyri, at endamálið um granskingargrundaða útbúgving á altjóða stigi verður rokkið.
2. Viðmerkja útbúgvingarprofilar, námsskipanir og nýggjar ella nógv broyttar skeiðslýsingar.
3. Viðmerkja tilmæli frá útbúgvingarleiðara um korrigerandi átøk sum lið í eftirmeting av undirvísing og útbúgvingum.
4. Góðkenna umsóknir um avriksflutning eftir tilmæli frá útbúgvingarleiðara og tryggja, at tær verða viðgjørdar á rættan hátt.
5. Stuðla undir átøk, sum menna útbúgving og undirvísing á Fróðskaparsetri Føroya.

*Ad.1:* Lestrarráð hava eftirlit við, at útbúgvingarnar hava ta dygd, tær skulu hava, t.e.at útbúgvingarnar eru granskingargrundaðar, at útbúgvingarnar eru á altjóða stigi og at tær eru viðkomandi fyri samfelagið. Til at meta um hesi viðurskifti skulu lestrarráð styðja seg til ásetingar í ”European Standards and Guidelines for Quality Assurance in the European Higher Education Area” (ESG) og Bologna-sáttmálanum og seinni viðtøkum umframt góðskupolitikki og reglum Fróðskaparsetursins.

*Ad. 2:* Lestrarráð fáa uppskot til nýggjar og broyttar námsskipanir og útbúgvingarprofilar frá útbúgvingarleiðara at viðmerkja, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Lestrarráð viðmerkja broytingar í bygnaði, endamáli, læruúrtøkum, førleikum, próvtøkuháttum umframt aðrar størri broytingar í útbúgvingunum. Smærri broytingar í námsskipanum og útbúgvingarprofilum verða latnar lestrarráðum til kunningar. Avvarðandi dekanur skal góðkenna nýggjar námsskipanir og allar broytingar í námsskipanum.

Útbúgvingarleiðarin góðkennir skeiðslýsingar, men allar nýggjar skeiðslýsingar og størri broytingar í skeiðslýsingum – so sum broytingar í læruúrtøkum, endamáli ella próvtøkuhátti – verða latnar lestrarráðum til viðmerkingar. Lestrarráð hava eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið og samlaðu læruúrtøkuna fyri útbúgvingina. Lestrarráð skulu eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið og samlaðu læruúrtøkuna fyri útbúgvingina.

*Ad. 3:* Lestrarráð skulu ansa eftir, at útbúgving og undirvísing verða góðskutryggjaðar og góðskumentar. Lestrarráð fáa høvi at viðgera og viðmerkja tillagingar, sum útbúgvingarleiðari mælir til at gera, við støði í niðurstøðum av eftirmetingum.

*Ad. 4:* Lestrarráð góðkenna avriksflutning, verða hoyrd í sambandi við endurskoðan av reglugerðum og mannagongdum viðvíkjandi avriksflutningi og hava eftirlit við, at reglur og mannagongdir verða hildnar. Í førum, har ivaleyst og væl skjalprógvað fordømi er um sambæriligan avriksflutning, kann fyrisitingin leggja mál fyri útbúgvingarleiðaran til støðutakan, uttan at lestrarráðið viðger málið.

*Ad. 5:* Lestrarráð skulu stuðla undir átøk, sum betra um lestrarumhvørvið og sum virka fyri samstarvi millum útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum. Lestrarráð skulu viðgera mál um útbúgving og undirvísing, sum setursleiðslan ella dekanur leggur fyri ráðið, og kunnu harumframt taka mál til viðgerðar, sum verða send ráðnum frá viðkomandi áhugapørtum, t.d. hava møguleika at gera viðmerkingar til uppskot um broytingar í útbúgvingarkunngerðum.

## Skipan og val av lestrarráði

Eitt lestrarráð er fyri hvørja deild á Setrinum. Vísindastarvsfólk og lesandi hava eins nógv umboð í lestrarráðnum, og talið av limum er hetta:

- Føroyamálsdeildin: 3 vísindastarvsfólk og 3 lesandi
- Námsvísindadeildin: 4 vísindastarvsfólk og 4 lesandi
- Náttúruvísindadeildin: 3 vísindastarvsfólk og 3 lesandi
- Søgu- og samfelagsdeildin: 4 vísindastarvsfólk og 4 lesandi
- Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi: 3 vísindastarvsfólk og 3 lesandi

Umframt ásetta talið av limum í einstøku lestrarráðunum skal hvørt lestrarráð hava 1 varalim umboðandi vísindastarvsfólk og 1 varalim umboðandi lesandi. Varalimir verða valdir við sama títtleika og eftir somu mannagongd sum ráðslimir.

Sessirnir sum ávikavist limur og varalimur í einstøku lestrarráðunum verða býttir eftir innanhýsis atkvøðutali. Er val farið fram sum friðarval uttan atkvøðugreiðslu, avtalar avvarðandi lestrarráð á fyrstkomandi fundi eftir valið, hvussu sessirnir sum limur og varalimur skulu býtast – og fæst ikki semja í ráðnum hesum viðvíkjandi, tekur rektarin avgerð.

Umboð fyri vísindastarvsfólk sita trý ár í senn, meðan umboð fyri lesandi sita tvey ár í senn. Limur, sum er í farloyvi, kann ikki vera virkin í lestrarráðnum í farloyvistíðarskeiðnum. Rektarin á Setrinum skipar fyri vali, tá nýtt lestrarráð skal veljast ella tá einstakir limir standa fyri vali til lestrarráð. Valið av teimum lesandi fer fram í samstarvi millum fyrisitingina á Setrinum og Ráð teirra lesandi (RTL). Øll vísindastarvsfólk, her íroknað ph.d.-lesandi, sum eru í starvi tann fyrsta í mánaðinum, valið fer fram, og sum eru sett minst hálva tíð, hava valrætt og eru valbær til lestrarráð. Dekanar og varadekanar eru ikki valbærir til lestrarráð, men hava tó valrætt. Øll lesandi, sum eru innskrivað til eina útbúgving á Fróðskaparsetrinum tann fyrsta í mánaðinum, valið fer fram, hava valrætt og eru valbær.

Avgreiðslan av lestrarráðsvali fer fram samsvarandi "Mannagongd fyri lestrarráðsval á Fróðskaparsetri Føroya", sum rektarin hevur ásett og hevur heimild at broyta eftir tørvi. Miðast skal eftir kynsligari javnstøðu í einstøku lestrarráðunum.

Skjótast gjørligt og innan eina viku eftir lestrarráðsval kallar skrivarin saman til fundar at skipa ráðið við ávikavist forfólki millum valdu vísindastarvsfólkini og næstforfólki millum valdu umboðini fyri

lesandi, um hesi hava staðið fyri vali. Á fyrsta fundinum verður eisini ásett fundarætlan, eins og møguliga nýggir limir fáa kunning um arbeiðið hjá lestrarráðnum.

Næstforfólkið luttekur í arbeiðinum við at leggja til rættis arbeiðið hjá lestrarráðnum.

Um ráðslimur av einhvørjari orsøk fer úr lestrarráðnum í úrtíð, kemur næstvaldi - ella avtalaði varalimurin um friðarval hevur verið - eftir raðfylgju á listanum hjá ávikavist vísindastarvsfólki og lesandi til seinasta val inn sum limur í avvarðandi lestrarráð. Um ongin varalimur er tøkur, verður skipað fyri vali av nýggjum ráðslimi og varalimum, tó soleiðis, at um tað er styttri enn 3 mánaðir til næsta regluliga val, so verða nýggjur ráðslimur og varalimir ikki valdir fyrr enn á regluliga valinum. Hetta er tó ikki galdandi, um forfólk fer úr ráðnum í úrtíð og ongin av hinum ráðslimunum ynskir at yvirtaka sessin sum forfólk, ella um ráðið missir sítt viðtøkuføri, tí fleiri ráðslimir samstundis fara úr ráðnum í úrtíð; í slíkum føri skal beinanvegin skipast fyri vali av nýggjum forfólki ella ráðslimum, fyri at lestrarráðið framhaldandi kann vera viðtøkuført.

Lesandi verða samsýnt fyri fundarvirksemi í lestrarráðum sambært nærri reglum um samsýning ásettar av rektaranum fyri Setrið.

## Fundarskipan

Lestrarráð koma saman til fundar eftir tørvi. Fundarætlan verður gjørd fyri hvørja lestrarhálvu.

Um mál hava skund, kann forfólkið heita á lestrarráðslimirnar um at viðgera mál skrivliga millum føstu fundirnar. Mál, ið krevja, at limirnir gera eina skrivliga viðgerð, skulu sendast teimum í so góðari tíð, at teir hava minst tríggjar arbeiðsdagar at lata forfólkinum sítt svar. Forfólkið skal tilskila, nær freist er at svara. Ein limur kann krevja, at málið verður lagt fyri lestrarráðið til viðgerðar á einum eykafundi. Grundgevast skal fyri kravinum. Kemur eitt tílíkt krav frá einum limi, hevur forfólkið ábyrgd av at seta málið á dagsskrá og fyrireika tað til viðgerðar á eykafundinum.

Forfólkið skal eftirlíka umbøn um eykafund, um ein meiriluti av limunum í lestrarráðnum lata inn skrivliga umbøn um eykafund við lýstari dagsskrá. Eykafundur skal haldast innan 14 dagar eftir, at forfólkið hevur fingið áheitanina – tó skal fundurin haldast fyrr, um málið hevur serligan skund, ella vandi er fyri, at málið fyrnast ella verður truplari, um bíðað verður.

Ein skrivari við talurætti, men ikki atkvøðurætti, er knýttur at hvørjum lestrarráði.

Lestrarráð eiga eftir tørvi bjóða øðrum, ið ikki eru limir í lestrarráðnum, á fund hjá lestrarráðnum fyri at leita sær sakkunnleika, vitan og íblástur um ítøkilig mál ella evni, sum verða viðgjørd í lestrarráðnum.

Lestrarráðslimir hava skyldu at luttaka á ásettum fundum í lestrarráðnum. Um ein limur í lestrarráðnum ikki fær møtt á fundi, skal avboð latast skrivaranum skjótast til ber áðrenn fundin.

Lestrarráðsfundir eru ikki almennir.

Lestrarráðslimir, skrivari og møguliga onnur, sum luttaka á lestrarráðsfundi, hava tagnarskyldu sambært ásetingum í fyrisitingarlógini.

Fundir verða sum meginregla hildnir á Fróðskaparsetrinum, tó kann forfólkið áseta annan fundarstað.

## Fundarinnkalling og dagsskrá

Skrivarin hevur saman við forfólki ábyrgdina av, at fundarinnkalling, dagsskrá og alt viðkomandi tilfar til fundin er atkomuligt í teldutøkum formi fyri allar lestrarráðslimir í seinasta lagi tríggjar arbeiðsdagar áðrenn fundin. Undir serligum umstøðum kann freistin tó vera styttri.

Forfólkið kann avgera, at rein avgreiðslumál verða viðgjørd við skrivligari viðgerð.

Allir limir í lestrarráðnum kunnu biðja um at fáa mál á skrá. Ein limur, ið ynskir mál á skránna til ásettan fund, skal lata skrivaranum mál og alt tilfar, ið hoyrir málinum til, í minsta lagi 5 dagar áðrenn fundin.

## Fundarleiðsla

Forfólkið leiðir fundin og atkvøðugreiðslurnar.

Forfólkið staðfestir við fundarbyrjan, um freistin fyri innkalling er hildin, og um ráðið er viðtøkuført. Skrivarin skrásetir limir, ið møttir eru. Lestrarráðið er viðtøkuført, um forfólkið er til staðar og til samans meira enn helvtin av limunum eru møttir á fundinum.

Forfólkið avger í hvørjari raðfylgju, málini verða viðgjørd, uttan so at minst 2 limir seta fram ynski um, at atkvøtt verður um raðfylgjuna. Tá fundurin byrjar, kunnu limir siga sína hugsan um raðfylgjuna í skránni. Fast punkt á skránni er endalig góðkenning av fundarfrásøgnini frá seinasta fundi.

## Ógegni

Samsvarandi fyrisitingarlógini er tað skylda hjá einstaka lestrarráðsliminum at boða avvarðandi lestrarráði frá viðurskiftum, ið kunnu viðføra ógegni í einstaka málinum. Lestrarráðið avger – uttan luttøku frá avvarðandi – um lestrarráðslimur er ógegnigur og tískil hvørki skal luttaka í viðgerðini ella avgerðini av ítøkiliga málinum. Um lestraráðið ikki er viðtøkuført orsakað av ógegni, verður farið fram sambært ásetingunum um hetta í fyrisitingarlógini.

## Viðgerð og atkvøðugreiðsla

Avgerðir kunnu einans takast um mál, ið sett eru upp sum serstakt punkt á dagsskránni. Um allir møttu limirnir ikki mótmæla, kunnu avgerðir tó takast í málum, sum hava skund, men sum ikki standa á skránni. Forfólkið kann velja at taka mál av skrá.

Forfólkið avger, hvussu atkvøðugreiðslur verða avgreiddar, t.d. við at rætta hondina upp.

Ein atkvøðugreiðsla verður avgjørd við meiriluta millum tey, sum hava atkvøðurætt og sum eru møtt á fundinum. Um so er, at ein atkvøðugreiðsla stendur á jøvnum, er atkvøðan hjá forfólkinum avgerandi.

## Fundarfrásagnir og avgreiðsla av málum

Skrivarin ger fundarfrásøgn frá lestrarráðsfundi. Teldutøk fundarfrásøgn skal vera atkomulig hjá limunum til góðkenningar innan 14 dagar eftir fundin. Fundarfrásøgnin skal tilskila, hvørjir limir luttóku á fundinum. Um limir í lestrarráðnum eru ósamdir um frásøgnina í einum máli, kunnu teir krevja, at teirra sjónarmið verður lýst í fundarfrásøgnini.

Fundarfrásøgnin verður almannakunngjørd millum starvsfólk og lesandi á Setrinum, tá hon er endaliga góðkend av øllum, sum vóru á fundinum, og í seinasta lagi á næsta fundi.
Skrivarin hevur ábyrgdina av, at mál, sum lestrarráðið hevur tikið avgerð um, verða avgreidd í samstarvi við fyrisitingina.

## Avgerðarheimildir rektarans

Møgulig tulkingarivamál í sambandi við hesa reglugerð skulu leggjast fyri rektaran til støðutakan. Í týðandi málum, sum viðvíkja dagliga virkseminum á Setrinum, kann rektarin – eftir tørvi í samráð við avvarandi lestrarráð – víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð.

## Gildiskoma

Henda reglugerð fyri lestrarráð á Fróðskaparsetri Føroya kemur í gildi 1. mars 2024.

Tórshavn, 22. februar 2024
Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya